# Vestmanna Timburhandil - søkir eftir fólki til nýggju deildina í Kollafirði

Í sambandi við, at vit lata upp nýggja deild í Kollafirði verður søkt eftir fólki.

## Til goymsluna

Søkt verður eftir fólki til goymslu okkara í Kollafirði.

### Uppgávur

Arbeiði umfatar alt vanligt goymsluarbeiði, herundir útkoyring av vøru.

### Førleikakrøv

Umráðandi er, at viðkomandi:

- er røkin
- kennir ábyrgd fyri uppgávunum
- hevur góðsamstarvsevni
- er fúsur at takað eitt eyka tak, í einum til tíðir rokmiklum umhvørvi.

## Til søludeildina

Søkt verður eftir fólki til søludeildina í Kollafirði.

### Uppgávur

Arbeiði umfatar alt vanligt samskifti við kundar okkara, herundir útrokning av tilboðum og annað vanligt søluarbeiði.

### Førleikakrøv

Umráðandi er, at viðkomandi:

- hevur royndir innan søluarbeiði
- er røkin
- kennir ábyrgd fyri uppgávunum
- hevur góð samstarvsevni
- er fúsur at takað eitt eyka tak, í einum til tíðir rokmiklum umhvørvi.

## Løn og setanartreytir

Lønin verður ásett eftir avtalu.

## Nærri upplýsingar um størvini

Nærri upplýsingar um starvi fáast við at venda sær til Vestmanna Timburhandil, Regin Joensen, telefon 472000.

## Umsóknir

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknarfreistin er 20. november 2004 og skulu umsóknirnar stílast til: Vestmanna Timburhandil P/F, FO-350 Vestmanna.

pf VESTMANNA TIMBURHANDIL

*Pf. Vestmanna Timburhandil er stovnaður í 1958, og hevur síðani 1977 selt og framleitt tey vælumtóktu Fjarða-húsini. Virksemi er nógv økt seinastu árini. Í dag standa omanfyri 390 Fjarðahús í Føroyum. Umframt at framleiða Fjarðahúsini reka vit timburhandil og byggibúð.*

**- tú velur væl!**

Vestmanna - Tel 472000 - Faks 472001- vt@vt.fo - www.fjardahus.fo


# Google táttar í 300 milliardir

TÍÐINDASKRIV

Internetgrundaða leitimaskinan Google hevur meira enn tvífaldað marknaðarvirði sítt eftir bert tveimum mánaðaum á partabrævamarknaðinum. Soleiðis er virðið hjá Google nú við at røkka teimum 300 mia. krónunum.

Tá amerikanska fyritøkan fór á partabrævamarknaðin, skuldu partaeigarar gjalda 85 dollarar fyri hvørt partabrævið. Google endaði mánakvøldið á partabrævamarknaðinum í New York við at kosta 187,4 dollarar fyri hvørt partabrævið. Hetta er ein hækking á 120 prosent.

Við einum marknaðarvirði á 51,4 mia. dollarar, sum svarar til 299 mia.kr., er Google heilar 107 mia. kr. meira verd enn størsta fyritøka í Danmark, A.P. Møller-Mærsk.

*Kelda: www.sparikassin.fo*


P/F ALMA
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

Munters
THE HUMIDITY EXPERT

Munters produktini avfukta kølirúm, frystirúm og aðrar goymslur, produktiónshølir, teknikkrúm, turkirúm, garagur, loftsrúm og kjallarar við kondensrupuleikum, eins og onnur hølir har fukt ella kondens kann gera skaða, ella eitt turrari umhvørvi er eitt ynski ella krav.

Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn
Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00 – mail: henrik@alma.fo





BJARTI MOHR

Tórshavn, fyrst og fremst
- ein góð kommuna fyri øll

XA
FÓLKAFLOKKURIN




# Kjafturin á føroyabankatoskinum er ikki sundurskræddur

**Tað er ber ein evarska lítil partur av toskinum sum ber merki av, at hann fyrr er krøktur við húki. Hjá meginpartinum av toskinum er einki at síggja.**


**Eyðfinn Magnussen**
*Biologur, Fróðskaparsetur Føroya*


Í blaðgrein í Sosialinum 7. august var yvirskriftin ***"Helvtin av toskinum á Føroyabanka er "defektur""***

Greinin bygdi á samrøðu við Mortan Johannesen , sum við báti sínum hevði verið á snelluveiðu á Føroyabanka. Í greinini sigur Mortan *"Eg haldi, tað er ófrættakent at síggja toskin á bankanum í ár. Meira enn annar hvør toskur er skræddur í munnklovanum — í minsta lagi øðrumegin og í fleiri førum báðumegin......... - Hetta havi eg í mínum langa lívi á sjónum ongantíð sæð áður". Mortan heldur støðuna vera álvarsama og sigur " Hetta er eitt fyribrigdi, sum eg avgjørt haldi eigur at takast við í metingarnar av veiðitrýstinum".*

Í einum seinri blaði hevði blaðmaðurin á Sosialinum samrøðu við Hjalta á Jákupsstovu stjóra á Fiskirannsóknarstovuni. Hesin segði tá, at Fiskirannsóknarstovan ikki hevði kannað, hvussu stórur partur av fiskinum á Føroyabanka hevði skaddan kjaft.



## Kjafturin er nú kannaður

Hesar kanningarnar eru nú gjørdar, og tær vísa, at fyri bankan sum heild er støðan ikki so álvarsom sum, sum Mortan metti hana at vera. Av teimum 180 kannaðu toskunum, vóru tað ber 3 fiskar, sum bóru merki av, at húkur hevði verið krøktur í kjaftin. Hjá øllum trimum fiskunum var sárið samanaftur vaksið. Hetta svarar til at einans 1,6 % av fiskinum er merktur av húkaveiðu. At fiskur dettur av aftur, serliga í ringum veðri, er vanligt. Hetta er serliga galdandi fyri stóran fisk. Toskurin á bankanum er munandi smærri nú, enn hann hevur verið. Hetta ger, at hann tí ikki slitnar líka lætt av línuni, sum hann hevur gjørt.

Kanningarnar av toskakjaftinum vórðu gjørdar, tá Magnus Heinason gjørdi yvirlitstrolingar á Føroyabanka 10. til 14. september 2004. Fyri at tryggja, at úrslitið er eftirfarandi, varð kanningin spjadd um allan bankan, har toskur er at fáa. Prøvar vórðu tiknir á 11 ymiskum støðum, har millum 4 og 48 fiskar vóru kannaðir á hvørjari støð. Teir 3 fiskarnir við skaddum kjafti, vóru fingnir á 3 ymiskum støðum.

## Minni til og smærri toskur

At veiðitrýstið er ov stórt á Føroyabanka, hevur Mortan Johannesen rætt í. Hetta sæst eisini aftur í veiðuni. Samlaða veiðan av toski hjá Magnus Heinasyni hendan túrin var 1596 kg. Hetta er bert helmingurin av toskaveiðuni samanborið við heystyvirlitistrolingini í 2003 og einans 23% av veiðuni í 2002. Nøgdin av toski er ikki einans minkað. Toskurin er eisini vorðin smærri. Í seinru helvt av 1990-árunum var miðallongdin á toskinum á Føroyabanka umleið 90 cm og vigaðu hesir um 9 kg. Í ár er miðallongdin minkað niður í 65-70 cm, og miðalvektin er 4,2 kg.

Men tað er ein heilt onnur søga.



# Popplist 3 - spennandi og forkunnugt

**Hósdagin var útgávudagur í 3'aranum í SMS. Triðja fløgan í savnrøðini Popplist 3 er komin á marknaðin, har tað besta innan føroyskan tónleik er savnað, nýtt og forkunnugt tilfar**

TÓNLEIKUR


*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*


Hósdagin var móttøka í 3'aranum í SMS. Triðja fløgan í savnrøðini Popplist er komin á marknaðin og eru tað Tutl og 3'arin, ið geva út.

Tónleikarar, vinfólk teirra, útgevarar, fjølmiðlar og onnur tónleikaáhugað hittust hesa útgávuhugnaløtuna, og nýggja stjørnuskotið, Kristleif Zachariasen, undirhelt við sangi og spæli.

## Sami leistur hesaferð

Høgni Zachariassen úr 3'aranum sigur, at talan er um sama leist hesaferð, sum á teimum báðum undanfarnu fløgunum.

– Tað hevur riggað væl hini árini og vit vóna tað sama hesaferð, hóast broyttan marknað. Men vit hava eina sterka og spennandi vøru, og talan er veruliga um eitt gott hugskot, eitt sterkt konsept, ið vísir seg at bera til, sigur Høgni Zachariassen.

- Vit hava verið nøgdir hini árini, tað melur runt, og tónleikararnir fáa eisini nøkur oyru, sigur Høgni.

Talan er á fløguni um at taka tónleik úr árinum, ið fór, og blanda við klassikarar og tilfar, ið er meira forkunnugt og sum ikki er læt at fáa hendur á, - kanska tí tað ikki áður er útgivið.

Við á Popplist hesaferð eru Teitur, Kristel, Johan í Kollafirði, Lena, Petsi Tvørfoss, Gunnar, Høgni Lisberg, Eivør, I Am, Devided Minds, Enekk, Kristleif Zachariasen, Annika Hoydal, Headache Blues trio, Blátt, Joka, Lokum, Charles Gade og Pætur við Keldu.


**Stovnið breiðband áðrenn 1. nov. 2004 fyri**




**Nú er seinasta freist at bíleggja I-net Privat Breiðband frá Føroya Tele púra ókeypis - og harvið spara 750,- kr.**

| Nýtslutørvur | Nýtslumynstur | Prísur/mðr. | Ferð | Nýtslugjøld |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Lágur | Surf, postur, chat og spæl | Kr. 280,- | 256k/128 | 50 oyru/Mbyte. kl. 08-18<br>40 oyru/Mbyte. kl. 18-08<br>Nýtt Príslækking! |
| Miðal til stórur | Surf, postur, chat, spæl og tónleikur | Kr. 595,- | 512k/128 | ÓKEYPIS upp til 2 Gbyte<br>50 oyru/Mbyte. kl. 08-18<br>40 oyru/Mbyte. kl. 18-08<br>Nýtt Príslækking! |
| Stórur | Surf, postur, chat, spæl, tónleikur og filmur | Kr. 895,- | 1024k/128 | ÓKEYPIS upp til 3 Gbyte<br>50 oyru/Mbyte. kl. 08-18<br>40 oyru/Mbyte. kl. 18-24<br>ÓKEYPIS kl. 24-08<br>Nýtt Príslækking! |

**Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...**

I·net BREIÐBAND

**) Treytað av at tú teknar I·net privat breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 1. novembur 2004. Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.*

FØROYA TELE